## Amerikanari vil keypa Arsenal

Enn ein ríkmaður er á veg inn í ensku Premier League. Hesaferð er tað london-felagið, Arsenal, sum ein amerikumaður ætlar at keypa. Nógv Premier League feløg eru longu keypt av ríkmonnum seinastu tíðina, og Arsenal tykist vera næsta felagið í røðini. Tað er rímaðurin, Stan Kroenke, ið vil keypa Arsenal. Í forvegin eigur Roenke NHL-felagið, Colorado Avalanche, og NBA-liðið, Denver Nuggets. Roenke er mettur at vera góður fyri yvir 11 milliardir krónur.

## Triðja uppflytingardystin í kvøld

Mjølnir endaði niðast í meistaradeildini hjá kvinnum í ár, og tí skuldu tær spæla ein upp- & niðurflytingardyst ímóti Fleyr, sum endaði á øðrum plássi í 1. deild. Fyrsta dystin vann Mjølnir 3-0 í Havn, men í seinna dystinum í Klaksvík svaraði Fleyr aftur. Tær vunnu 3-2, og tí skal ein triði og avgerandi dystur til fyri at finna ein vinnara. Hesin dystur er nú settur at vera í høllini í Kollafirði í kvøld kl. 19.30. SÍ skal døma dystin.

# Sponsorklubbi fyri føroysk virki

**Todi Jónsson og Fremad Amager ætla at gera ein føroyskan sponsorklubba, har føroysk virki, stór sum smá, kunnu seta pening í fyri at stuðla menningini av ungum føroyskum leikarum**




*Felagið handan Fremad Amager ætlar at gera ein føroyskan sponsorklubbah ar føroysk virki kunnu seta pening í fyri at stuðla menningini av ungum føroyskum leikarum.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Fleiri av fólkunum handan keypið av felagnum Fremad Amager høvdu tíðindafund hjá Eik í gjár. Hetta var fyrsti tíðindafundur, sum varð hildin í Føroyum í hesum sambandi.

Luttakararnir søgdu nógv av tí sama, sum bleiv sagt á tíðindafundinum í Danmark fyri góðari viku síðani, men móti endanum av tíðindafundinum boðaði Todi frá, at felagið ætlar at gera eitt føroyskt sponsor-toymi, sum skal stuðla ætlanini at menna ungar føroyskar spælarar.

**Team Føroyar Business Club**

Teir fýra, Todi Jónsson, Heini Zachariassen, Nicolai Kaas-Heilmann og Fritleif Olsen, eru samdir um, at Fremad Amager hevur møguleikar at gera seg galdandi í Superliguni.

Áhugin fyri føroysku íløguni í Fremad Amager er eisini stórur í Danmark, og tí hevur felagið hildið fast í mest sum øllum stuðlunum, samstundis sum nakrir eisini eru komnir afturat. Teir vilja tó gjarna hava, at føroysk virkir eisini verða partur av teirra ætlanum, og tí vilja teir gera ein føroyskan sponsorklubba. Her er ætlanin, at føroysk virki kunnu seta pening í fyri at stuðla ungum leikarum, sum vilja royna kreftir við útlendskan fótbólt. Hesin klubbin skal eita Team Føroyar Busines Club.

Hetta verður ein klubbi, har øll feløg kunnu seta pening í, bæði stór og smá. Ætlanin er eisini at geva áhugaðum feløgum ymsar ágóðar. Millum annað er ætlanin, at tey skulu sleppa til ymsar heimadystir hjá Fremad Amager, og verður hetta gjørt í samstarvi við Atlantic Airways.

Team Føroyar Business Club er liður í ætlanini hjá teimum at menna føroyskan fótbólt, og um hetta fer at rigga, so kann tað økja um møguleikarnar hjá ungum føroyskum leikarum at sleppa út um landoddarnar at spæla.

# Tvey met á sama teini

**Pál Joensen setti nýtt føroyskt met á teininum 100 m frí í HM-kappingini í Melbourne í nátt, men tríggjar minuttir seinni hevði Kristian Olsen sligið metið hjá Pál**




*Kristian Olsen tók føroyska metið, sum Pál Joensen hevði sett tríggjar minuttir áðrenn, á teininum 100 m frí í HM-kappingini í Melbourne. Her sæst Kristian saman við russanum Alexander Popovic, sum vann gull á bæði 5 m frí og 100 m frí á Olympisku leikunum í Barcelona í 1992 og Atlanta í 1996*

SVIMJING
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Teir fýra føroysku svimjararnir, sum luttaka í HM-kappingini í Melbourne í Avstralia í hesum døgum, hava fingið sera góð úrslit. Tey hava sett fleiri nýggj met, og í nátt gekst aftur væl hjá føroyingunum

Her vóru tað bert teir báðir dreingirnir í ferðalagnum, Pál Joensen og Kristian Olsen, sum skuldu í hylin. Teir skuldu báðir taka lut í kappingini 100 m frí, og ikki kann sigast annað enn, at úrslitini hjá teimum vóru avbera góð.

**Pál setti føroyskt met**

Tann fyrsti av teimum báðum, sum skuldi í hylin, var Pál Joensen úr Vágs Svimjifelag. Hann var tilmeldaður við tíðini 56,43 sekund, men hesa tíðina bøtti hann so dyggiliga um. Pál kom nevniliga á mál í tíðini 55,05, og sostatt tók hann næstan hálvtannað sekund av tilmeldingartíðini. Henda tíðin var eisini nýtt føroyskt met, og sostatt høvdu føroyingarnir í Melbourne sett enn eitt nýtt føroyskt met.

**Metið stóð í tríggjar minuttir**

Tveir riðlar seinni skuldi hin føroyski svimjarin í hylin. Kristian Olsen úr Ægir var tilmeldaður við tíðini 55,55 sekund, men hann gjørdi rættiliga bart í kappingini. Hann kom á mál í tíðini 54,43, og sostatt tók hann 0,62 sekund av metinum hjá Pál Joensen, sum slapp at standa í á leið tríggjar minuttir.

Kristian endaði á 101. plássi, meðan Pál endaði á 112. plássi av 169 luttakarum, og við hesum góðu úrslitum megnaðu báðir føroyingarnir, sum vóru í hylinum í nátt, at seta nýggj føroysk met, og enn ein góður føroyskur dagur í Melbourne var komin at enda.

Í morgin skal bert ein føroyskur luttakari í hylin. Tá skal Mona Simonsen úr Tvøroyrar Svimjifelag luttaka í kappingini á teininum 100 m frí.